Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 30.09.2021 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Erik Lervig


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Behandling af udvalgssag** | | | |
| 65/21 | 21/00088-2 | 21/00088 - Útstykking í Leirvík - Byggistig 2 | 3 |
| 66/21 | 21/00386-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00386 | 5 |
| 67/21 | 21/00340-2 | Eykajáttanir august 2021 | 6 |
| 68/21 | 20/00050-1 | Mál 20/00050 Nýtsla av Víkingahúsinum: málslýsing og tilmæli | 8 |
| 69/21 | 21/00391-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00391 | 11 |
| 70/21 | 21/00392-1 | Fíggjarætlan 2022 | 12 |
| | | | |

**Behandling af udvalgssag**

## 65/21 21/00088 - Útstykking í Leirvík - Byggistig 2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.02.2021 | 6/21 | 21/00088-2 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.03.2021 | 16/21 | 21/00088-2 |
| 3 Býráðið | 24.03.2021 | 27/21 | 21/00088-2 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.09.2021 | 34/21 | 21/00088-2 |
| 5 Fíggjarnevnd | 28.09.2021 | 54/21 | 21/00088-2 |
| 6 Býráðið | 30.09.2021 | 65/21 | 21/00088-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Teknistovan í Gøtu hevur gjørt eitt uppskot til byggistig 2 í samband við útstykkingina í Leirvík, sum skal góðkennast av býráðnum.<br>Talan er um 18 grundstykkir, og eitt økið á 3688 fermetrar, sum kann leggjast út til íbúðarbygging. (Víst verður til tekning í málinum).<br><br>Avtalað varð, at teknistovan skal gera eina kostnaðarmeting av verkætlanini til býráðsfundin tann 25 feb. 2021.<br><br>**Ískoyti 17-03-2021**<br>Av tí at uppskotið ikki er móttikið fyrr enn 16-03-2021, eru tekningarnar ikki viðgjørdar av teknisku umsiting.<br><br>**14-09-2021**<br>Lisitatión varð hildin á býráðsskrivstovuni í Norðragøtu tann 09.09.2021. Trý tilboð blivu latin inn.<br><br>Teknistovan hevur gjøgnumgingið tilboðini og gjørt eina innstilling til kommununa, har mælt verður til at fara í samráðingar við Articon um verkætlanina. |
| |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 4.000.000 kr. er sett av til endamálið á fíggjarætlanini fyri 2021.<br>Rest má játtast í 2022. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at samtykkja fyriliggjandi uppskot, ella koma við viðmerkingum, soleiðis at Teknistovan kann tillaga verkætlanina til komandi fund. |

**Ískoyti 17-03-2021**
Umsitingin heldur at tekningarnar eiga at verða viðgjørdar av teknisku umsiting, áðrenn avgerð verður tikin.

**14-09-2021**
Mælt verður til at fara undir samráðingar við Articon um verkætlanina.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. februar 2021**
Málið verður tikið av skrá. Umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. marts 2021**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 24. marts 2021**
Einmælt samtykt at gera útstykkingina sambært fyriliggjandi uppskoti frá Teknistovuni, við evt. broytingum frá teknisku umsiting hjá Eysturkommunu.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. september 2021**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

Petur Súni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

**Fíggjarnevnd 28. september 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 30. september 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini og byggi - og býarskipanarnevndini at taka av lægsta tilboðnum, sum er frá Articon á kr. 7.883.065 u/mvg

Petur Súni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

## 66/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00386

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.09.2021 | 36/21 | 21/00386-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.09.2021 | 55/21 | 21/00386-2 |
| 3 Býráðið | 30.09.2021 | 66/21 | 21/00386-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við sølu av matrikkul nr. 72f í Norðragøtu, hevur kommunan móttikið verkætlanaruppskot frá byggiharra.<br>Víst verður til skjal "*Eyðabø_verkætlanaruppskot_Sep2021"* í málinum.<br><br>Kommunan skal formelt viðgera fyriliggjandi uppskot, fyri at verkætlanin skal kunna forseta. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. september 2021**
Byggi – og býarskipanarnevndin ynskir at svar uppá óvissur í verkætlanini.

**Fíggjarnevnd 28. september 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi verkætlanaruppskot.

**Býráðið 30. september 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

# 67/21 Eykajáttanir august 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 23.08.2021 | 47/21 | 21/00340-2 |
| 2 Býráðið | 26.08.2021 | 62/21 | 21/00340-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 28.09.2021 | 49/21 | 21/00340-2 |
| 4 Býráðið | 30.09.2021 | 67/21 | 21/00340-2 |

**Málslýsing:**

Víst verður tilfyriliggjani skriv/frágreiðing viðv. eykajáttanum í august 2021, har greitt verður frá ta neyðugt er at veita eina samlaða eykajáttan á 5.750.00,00 kr. til ymiskar verkætlanir.

Eykajáttaninar eru hesar:

- Nýggjur vøllur í Norðragøtu á kr. 3.000.000,00
- Keyp av Limmilund á kr. 250.000,00
- Keyp av vegi til Norðoyatunnilin á kr. 850.000,00
- Gamli bátahylurin í Leirvík á kr. 250.000,00
- Kantsteinar v.m í Nýggjagerði í Leirvík á kr. 350.000,00
- Hitaskipan til skúlan í Leirvík og Giljagarð á kr. 1.000.000,00
- Tinglýsing v.m á kr. 50.000,00

**Ískoyti 22/9-21**

Euingin broyting er frá 1. viðgerð

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Av tí at mælt verður til at taka peningin av øðrum íløgujáttanujáttanum verða samlaður íløgurnar óbroyttar, og eykajáttaninar koma ikki at hava ávirkan á ætlaða úrslitið.

**Tilmæli**

Mælt verður til at veita eykajáttanir á íalt 5.750.000,00 kr.

Mælt verður til at eykajáttannar verða fíggjaðar við at 5 mió. kr. verða  tiknar avverandi játtan til barnagarðin í Gøtugjógv og 750 t.kr. verða tiknar av verandi játtan til bátahylin í Norðragøtu.

**Fíggjarnevnd 23. august 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. august 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevnd 28. september 2021**
Fíggjarnevndin mælir til veita eykajáttanir á kr. 5.750.000,00 eins og samtykt við 1. viðgerð.

**Býráðið 30. september 2021**
Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

## 68/21 Mál 20/00050 Nýtsla av Víkingahúsinum: málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 17.02.2020 | 5/20 | 20/00050-1 |
| 2 Býráðið | 27.02.2020 | 20/20 | 20/00050-1 |
| 3 Mentanarnevndin | 20.04.2020 | 34/20 | 20/00050-1 |
| 4 Mentanarnevndin | 21.09.2021 | 33/21 | 20/00050-1 |
| 5 Býráðið | 30.09.2021 | 68/21 | 20/00050-1 |

**Málslýsing:**

24. juni 2019 samtykti býráðið at innrætta ovasta hædd í Víkingahúsinum. Arbeiðið at innrætta ovaru hædd í Sarpugerði varð bjóðað í trimum arbeiðstøkum - timburarbeiðið, HVS og EL. Um alt gongur eftir ætlan verður arbeiðið liðugt í vár, og tá kann ovasta hæddin takast í brúk.

**Leiga av ovastu hædd í Víkingahúsinum**

Tá ovasta hædd er klár at taka í brúk, verður møguleiki at hava alskyns samkomur. Pláss verður fyri 132 fólkum sum kunnu sita til borðs. Ein køkur er eisini settur upp, men hetta er ikki ein industri-køkur.

Við nýggja hølinum í Víkingahúsinum, má støða takast til um hølini kunnu leigast út ella ei, ella um tey bert í ávísum førum kunnu leigast út. Harumframt má støða takast til um hvør skal samskipa útleiðing og um hvør skal hava møguligar leiguinntøkur.

**Hvør skal hava møguligar leiguinntøkur?**

Víkingahúsið er ein bygningur sum Eystukommuna eigur og rekur, so um húsið skal leigast út, má avgerð takast um, hvør skal hava inntøkurnar. Nøkur ítróttarhús í Føroyum eru ogn hjá ítróttarfelagnum, og her fær felagið sjálvandi allar inntøkur.

Umsitingin hevur spurt onkra kommunu sum eigur og leigar út ítróttarhús, her fær kommunan allar leiguinntøkurnar, sjálvt um ítróttarfelagið búleikast í húsinum.

Kunnast skal um, at Víkingahúsið uppi á Brekku í Leirvík verður leigað út til smærri tiltøk, og her fara leiguinntøkurnar til Víking. Talan er ikki um stórar upphæddir.

**Kapping**

Spurningurin um Víkingahúsið, sum er ein kommunalur bygningur, fer inn at kappast vit privatu vinnuna má eisini vendast.

Um talan er um m.a. veitslur, bingo og fundarvirksemi, so kann tað í summum førum verða talan um at tað kommunala fer at kappast við tað privata. Víkingahúsið hevur tó ongan industrikøk, og hevur tískil ikki somu møguleikar at gera mat sum privatar fyritøkur í Eysturkommunu.

Í einum øðrum nýggjum kommunalum bygningi er avgerð tikin, at hølini bert í serligum førum verða leigaði út. Orsøkin til hetta er m.a. at hava fyrilit um kapping á økinum.

**Umsiting av møguligari útleiðing**

Verður samtykt at hølini á ovastu hædd í Víkingahúsinum skulu útleigast til veitslur o.l., má støða takast til hvør skal umsita hølið. Her kann talan verða um klárgering/uppseting, vasking og vanlig samskipan av hølunum.

**Ískoyti 10. mars 2020**

Umsitingin hevur gjørt uppskot til reglugerð fyri útleigan av ovastu hædd í Víkingahúsinum.

---

**20. september 2021**
Síðan mars 2021 hevur ein “royndar reglugerða” verið brúkt í samband við útleigan av ovaru hædd á Víkingahúsinum.

Tá nevnda reglugerð var “sett í gildi” varð avgjørt, at hon skuldi eftirmetast í august 2021, fyri soleiðis at gera av um møguligar tillagingar ella broytingar skulu gerast.

Nú vit eru komin forbí hálvan septembur 2021, hevur “royndar reglugerðin” verði brúkt nakrar ferðir í samband við útleigan.

Royndirnar eru í tí stóra og heila, at reglugerðin liva upp til sítt endamál.

Umsitingin hevur spurt seg fyri hjá Magna Jarnskor, húsavørði, sum umsitur reglugerðina og skipara útleiganina, og er Magni av tí áskoðan, at reglugerðin er góð og kann saktans samtykkjast í tí líki hon er í dag.

Einasta viðmerkingin Magni hevur er, at í ásetingin í stk 2. er ásett at hølini “*skulu latast aftur í sama standi, sum tá tey vórðu útleigað*” mugu vit bara tryggja okkum og skipa so fyri, at hølini eru í góðum standi, tá vit leiga tey út (her verður hugsa, at tað er reint og ruddiligt).

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at endalig “Reglugerð fyri útleigan av ovastu hædd í Víkingahúsinum”, verður samtykt við tí orðing “royndar reglugerðin” hevur í dag. |

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 17. februar 2020</u>**
Mentanarnevndin mælir til, at nýtslan av ovastu hædd, at byrja við, bert verður við tálmaðum lokalum brúki. Stórur dentur verður lagdur á, at virksemið hjá Víkingi og øðrum frítíðarfelagsskapum í Eysturkommunu, ikki verður órógvað.

**<u>Viðtøka Býráðið 27. februar 2020</u>**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

*Brandur Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Mentanarnevndin 20. april 2020**
Mentanarnevndin mælir til at reglugerðin fyrst verður viðgjørd á meira óformellum støði í býráðnum, áðrenn málið verður tikið upp aftur.

**Mentanarnevndin 21. september 2021**
Mæla til at samtykkja reglugerðina sum hon er orðað í dag

**Býráðið 30. september 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

## 69/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00391

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.09.2021 | 37/21 | 21/00391-2 |
| 2 Býráðið | 30.09.2021 | 69/21 | 21/00391-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umbøn um ummæli í samband við marknaumskipan á matrikkul nr. 272a og 287a í Leirvík. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at viðmæla umsóknini um marknaumskipan á matrikkul nr. 272a og 287a í Leirvík, sambært umsókn. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. september 2021**
Byggi – býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. september 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi – og býarskipanarnevndini

Erik Lervig var úti undir viðgerðini vegna ógegni

## 70/21 Fíggjarætlan 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.09.2021 | 57/21 | 21/00392-1 |
| 2 Býráðið | 30.09.2021 | 70/21 | 21/00392-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan frá fíggjarnevndini. Uppskotið er eisni viðgjørt í øllum teimum føstu nevndunum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Fíggjarnevnd 28. september 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja ein rakstrarkarm og ein íløgukarm sambært fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2022. Rakstrarkarmurin verður 97,5 mió. kr. og íløgukarmurin verður 49 mió. kr.

**Býráðið 30. september 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tlmælinum hjá fíggjarnevndini.

fundurin lokin 19.00

---

Per Martin Gregersen

---

Hanna Jensen

---

Hjalti Dalheim

---

Katrin Kjartansdóttir

---

Magnus Skoralíð

---

Marjun Andreasardóttir

---

Rúni Justinussen

---

Marita Klein Joensen

---

Petur Súni Jacobsen